# BILATORGIÐ

**Føroyski brúktbilamarknaðurin - í Sosialinum hvønn hósdag**



**FORD FIESTA 1.8D**
Árg apr. 97, Km 128.000. *Prísur fyrr Kr. 60.000* – Nýsýnaður 25.07.03. Uttan býtisbil 50.000,- kr.



**FORD ESCORT**
Árg okt.97, Km 102.000. *Prísur fyrr Kr. 85.000* – Nýsýnaður 19.09.03. Uttan býtisbil 75.000,- Kr.



**FORD MONDEO 1.8 D**
Árg feb.95, Km 151.000. *Prísur fyrr Kr. 69.000* – Sýnaður 10.07.01. Uttan býtisbil 60.000,- kr.



**VOLVO S70 2.4**
Árg jun. 00, Km 122.000. *Prísur fyrr Kr. 228.000* – Sýnaður 06.05.02. Uttan býtisbil 218.000,- Kr.



**HONDA ACCORD 2.0I LS**
Árg okt. 00, Km 39.000. *Prísur fyrr Kr. 175.000* – Uttan býtisbil 165.000,- Kr.



**FORD MONDEO 2.5 V6 GHIA - STW**
Árg jun. 01, Km 21.000. *Prísur fyrr Kr. 229.000* – Uttan býtisbil 215.000,- Kr.



**TOYOTA AVENSIS 1.8**
Árg jul.99, Km 69.000. *Prísur fyrr Kr. 119.000* – Sýnaður 08.07.02. Uttan býtisbil 110.000,- Kr.



**HONDA ACCORD 1.8**
Árg Apr-98, Km 87.000. *Prísur fyrr Kr. 109.000* – Sýnaður 06.06.02. Uttan býtisbil 95.000,- Kr.



**VOLVO S40 1.8**
Árg mei.97, Km 94.000. *Prísur fyrr Kr. 119.000* – Sýnaður 13.03.03. Uttan býtisbil 110.000,- Kr.



**TOYOTA COROLLA 1.6 S/D**
Árg mei. 99, Km 60.000. *Prísur fyrr Kr. 105.000* – Nýsýnaður 10.09.03. Uttan býtisbil 95.000,-Kr.



**VOLVO S40 2.0**
Árg apr. 00, Km 57.000. *Prísur fyrr Kr. 210.000* – Uttan býtisbil 195.000,- Kr.

VOLVO RENAULT VR BILAR Hoyvíksvegur tel 322110



**MERCEDES BENZ 230 TE 7 PERSÓNA STATIONCAR.**
Árg Jun-91, Km 117.000. Rúmligur 7 persónabilur familjubilur til sølu.

Bilurin er í sera góðum standi. Nýsýnaður, eyka felgur við píkadekkum fylgja við, nýtt útstoyt (komplett), nýggjur akkumulator, nýggjar bremsuskivur framman og nýggjar el-rútavindarar. Søluprísur kr. 149.000.
**Nærri upplýsingar fáast við at ringja á tlf. 216135**



Sosialurin Lesið Sosialin -tað loysir seg!

W W W . S O S I A L U R I N . F O

AT VELJA PRENTSMIÐJU OG TIMBURMANN ER NAKAÐ TAÐ SAMA

Tit vilja hava fatur á tí besta handverkaranum, honum, tit kunnu hava álit á, einum meistara, ið ikki leggur eykarokning oman á eykarokning. Einum, sum kemur tann dagin, hann hevur lovað og verður liðugur tann dagin, hann hevur lovað.

Ljóðar hetta sum eitt brot burtur úr „Sagnum og ævintýrum"?

Á Hestprent smíða vit ikki hús, men vit gera alt grafiskt arbeiði.
Tað vil siga uppseting, prent og innbinding.

Tín prentlutur er í góðum hondum hjá okkum.
Hestprent gongur nú á tjúgunda ári, og eru vit vaksin til 20 starvsfólk.

Vilt tú vita meira, hava vitjan av sølumanni okkara, ella hava eitt tilboð sendandi, so eru vit altíð til dystin fús

HESTPRENT
Dvørgastígur 7
Postsmoga 3118
110 Tórshavn
Tel: 314555 • Fax: 318 026
t-post: hestoy@hestprent.fo

Bilar

Nr. 181 • hósdagur • 25. september 2003 • 77. árg.



*Hesin C2 VTR hevur SensoDrive skipan, har til ber at skifta gir á rattinum, við girstongini (Tiptronic) ella heilautomatiskt*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Citroën C2 1,6 VTR:

# Kvikur og sportligur býbilur

**Eftir at Citroën eru komnir á marknaðin við bæði C3 og C3 Pluriel, eru teir nú eisini komnir við C2 við trimum hurðum. Hóast bilurin er nakað styttri en C3, hava teir nógv til felags**



*Nýggi Citroën C2 VTR við 110 hk*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Eins og Citroën C3 er C2 ein rættuliga sermerktur bilur í útsjónd. C2 er bygdur yvir sama plattform sum C3 og C3 Pluriel. Tað er vorðið alt meira vanligt at bilverksmiðjurnar brúka sama plattform til ymisk modell, hóast bilarnir eru ymiskir í støðd.

Innan er alt í løttum og frískum litum á hesum fýrapersóna bilinum, og baksetrini kunnu flytast aftur og fram hvør sær. Baklúkan er tvídeild, fyri at tryggja at tað skal vera lætt at sleppa til viðførisrúmið undir øllum umstøðum. Ovari og niðari parturin av lúkuni kunnu latast upp hvør sær, soleiðis at um bilurin stendur parkeraður nær upp at einum veggi ella tætt upp at einum øðrum bili, er tað ongin trupulleiki at sleppa til viðførisrúmið.

## Advance, Prestige, Elegance og VTR

Bilurin fæst í útgávunum: Advance, Prestige, Elegance og VTR. Í standard útgávuni, Advance, er bilurin útgjørdur við t.d. seks airbag, ABS bremsum við elektroniskum bremsukraftdeilara, servostýring sum tillagar seg ferðina, rattið kann stillast allar vegir, sentrallás og automatiska læsing av hurðum og baklúku undir koyring, Prestige hevur t.d. el-síðurútar framman, fjarstýrt sentrallás og forsetur sum kann stillast í hædd. Elegance hevur har afturat tokulyktir, hita í setrunum, el-síðuspegl og aircondition. VTR er sportútgávan við t.d. tokulyktum framman, takspoilara, sportsetrum, lakeraðum sportkúfangarum og síðulistum.

C2 fæst við hesum trimum bensinmotorunum: 1,1 litur við 61 hk, 1,4 litur við 75 hk og 1,6 litur við 110 hk, og einum 1,4 litur HDI turbodiesel við 70 hk. Bilurin fæst við 5-trins manuellum girum og 5-trins SensoDrive girkassa, alt eftir útgerð og motorstødd, t.d. fæst HDI bert við manuellum girum.

Í VTR útgávuni er Citroën C2 er ein rættuliga kvikur og sportligur bilur at koyra. Hann er lættur at umgangast í tøttu ferðsluni í býnum og lættur at seta frá sær, har sum lítið pláss er til parkering. Bilurin er einans 3,66 m langur. Prísirnir byrja við 137.000 krónum fyri ein 1,1 litur Advance við 61 hk.

**Citroën C2 1,6i VTR**

| | |
|---|---|
| Motorurin: | 1,6 litur 4 syl. 16V 110 hk |
| 0-100 km/t: | 10,9 sek |
| Bensinnýtsla: | 15,9 km/l |
| Dekkstødd: | 195/45-16 |
| Stødd og vekt | |
| Longd: | 366,6 cm |
| Breidd: | 165,9 cm |
| Hædd: | 146,1 cm |
| Eginvekt: | 1050 kg |
| Viðførisrúm: | 193 litrar |
| Prísur: | Kr. 166.000,- ( VTR) |
| | Kr. 137.000,- (standard, Advance) |
| Søluumboð: | Ivan Johansen Bilar |
| | Hoyvíksvegur 63 |
| | FO-110 Tórshavn |
| | Tel. 313666 |
| | www.ivan.fo |



*Marni Nattestad, sølumaður hjá Ivan Johansen Bilum, sýnir her at C2 hevur tvídeilda baklúku.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*